# Deyðin kom úr rúmdini

Eitt altjóða granskaralið er komið til ta niðurstøðu, at dinosaurarnir vórðu útruddaðir, tí at ein risastórur rúmdarsteinur og jørðin stoyttu saman fyri 65 milliónum árum síðani. Nakrir av teimum 41 granskarunum, sum hava kannað málið, halda kortini, at teir seinastu dinosaurarnir doyðu av fleiri sera drúgvum eldgosum í Asia. Men teir flestu granskarnir halda, at dinosaurarnir vórðu útruddaðir, tá ein risastórur rúmdarsteinur, sum var um 15 kilometrar í tvørmát, rakti tað, sum í dag er Meksiko.



# Øði um yvirlýsing

Í Turkalandi eru fólk í øðini, tí at uttanríkisnevndin hjá amerikanska Umboðsmannatinginum hevur samtykt eina yvirlýsing, sum flokkar turkiska ágangin ímóti tí armenska fólkinum undir fyrra heimsbardaga undir hugtakið "hópmorð". Yvirlýsingin bleiv samtykt, hóast bæði Barack Obama, forseti, og turkiska stjórnin mæltu frá. 23 limir í uttanríkisnevndini atkvøddu fyri yvirlýsingini, og 22 atkvøddu ímóti. Turkiska stjórnin svaraði alt fyri eitt við at biðja sín sendiharra í Washington koma heim.





*Javnstøðuarbeiðið tykist at hava flutt seg frá arbeiðarakvinnum til at snúgva seg um meir vald og fleiri nevndarsessir til vælbjargaðar frúur í mistaðarøkinum*

tosar um tað, og so slettis ikki elitiefeministarnir, sum sambært Munk »leggja meiri dent á, at teirra egnu døtur fáa møguleika at fáa ein nevndarsess í vinnulívinum."

Heldur ikki í Føroyum verður tosað um hetta, hóast tøl vísa, at í fólkaskúlanum her heima eru nógv fleiri dreingir enn gentur, sum hava trupulleikar í skúlanum, staðfestir Sámal Matras Kristiansen.

Spurd um tað kann hugsast, at Kvinnufelagið stríðist á skeivum hermóti, sigur Tina K. Jacobsen, at hon ikki rættiliga hevur sett seg inn í kjakið um nýggja proletariatið av monnum.

- Um hatta er veruleikin, er tað sjálvandi ein álvarslig kreppustøða, sum onkur má taka hond um. Eg eri tó ikki vís í, at tað eru vit, sum skulu gera tað, tí vit eru fyrst og fremst eitt kvinnufelag. Í nevndini er heldur ikki semja um, hvørt mannfólk skulu sleppa at verða limir hjá okkum. Men ongin forðar monnunum í at gera eitt mannfólkafelag, og vit vilja fegnar samstarva við teir, um so er, sigur hon og minnir á, at aftur her er tað ein spurningur um, hvar felagið skal leggja sína orku.

## Stríð móti mytum

Ongin skal tó vera í iva um, at Kvinnufelagið fyrst og fremst arbeiðir fyri rættindum hjá øllum kvinnum og ikki bara teimum fáu útvaldu, staðfestir Tina K. Jacobsen, hóast hon ásannar, at myndin av felagum úteftir er vorðin nakað einsháttað.

- Um fólk hava ta fatan, at vit bara arbeiða fyri at fáa vælbjargaðar frúur upp í toppin á samfelagnum, so er tað ein fatan, vit mugu taka til eftirtektar og royna at broyta. Møguliga er tað okkurt, vit hava gjørt skeivt, men tað kann eisini hugsast, at fólk ikki hava fylgt nóg væl við í okkara arbeiði ella bara síggja tað, tey vilja síggja.

Hon minnir á, at hetta heldur ikki er fyrstu ferð eitt kvinnufelag má berjast móti gomlum mytum og misskiltum fatanum.

- Tað eru enn fólk sum halda, at Kvinnufelagið er ein samling av gomlum, beiskum kvinnum, sum hata menn og brenna bróstháldarar. Hatta er ein ímynd frá 1970'unum, sum kvinnufeløg kring allan heim hava stríðst við líka síðani. Og tað er harmiligt í allar mátar, ikki minst tí tað ger tað trupult at røkka ungum kvinnum.

Her hevur Kvinnufelagið eisini eina stóra avbjóðing, og tí verður nógv gjørt í løtuni fyri at rista slíkar ímyndir av sær. Millum annað hevur felagið júst fingið eitt nýtt búmerki, sum signalerar, at javnstøða gongur báðar vegir, eins og heimasíðan nú fær eitt meir modernað snið.

Heilt stygdar burtur eru ungu kvinnurnar tó ikki, tí sambært forkvinnuni í Kvinnufelagnum er talið á ungum kvinnum í limaskaranum vaksið alsamt seinnu árini.

*"Ongin forðar monnunum í at gera ein mannfólkafelag, og vit vilja fegnar samstarva við teir, um so er*